DAGBÓK

25. februar: Mánin næstur jørðini. 20. vika á vetri endar.
26. februar: 3. sunnudagur í føstu. Vit byrja 21. viku á vetri.
1. mars: Mikudagin er fyrsti mars. Henda dagin risur sólin kl. 7.34 og setur kl. 17,46.
3. mars seinna kvarter.

— — —

MARS: mánaðurin er uppkallaður eftir rómverska kríggsgudinum Mars.
Mars er eisini ein av planetunum. Hon er 228 milj. km frá sólini (jørðin 150milj. km) tvørmál hennara er 6800 km (jørðin 12.756 km), snúðingstíðin um seg sjálvan er 24 tímar og 37 mín. (jørðin 23 tímar og 56 mín.), umferðartíðin um sólina er 686.98 dagar (jørðin 365.26 dagar). Mars hevur tveir mánar mótvegis jørð okkara við bara einum.
Kring um Mars er tunt lufthav. Tað kann verða uppí 16 hitastig á Mars.

HONskrivar

MÓTIN FYLGIR ÍTRÓTTAFÓLKUNUM

Av tí at tað verður olympiada í Meksiko, skulu nútíðarkvinnur siggia meksikanskar út í summar. Hetta er komið fram í Frankariki, har konfektiónsfabrikantar upprunaliga fylgdu teimum stóru mótahúsunum, men nú hava tikið broddin av mótakongunum og sjálvir sett sær fyri at avgera, hvussu nótarnir skulu vera.



* Hugskotið til nýggju mótarnir
* hava teir fingið frá mayaru-
* num, men eisini frá meira nú-
* tímans meksikanskum móta-
* sniði. Hetta verða buksudrakt-
* ir í livligum litum, broderin-
* num o.s.fr. Alt hetta hendir,
* sjálvt um olympiadan ikki
* verður fyrr enn í 1968.

GÓÐ RÁÐ



Set ein tallerk undir hina mest brúktu gassflammuna. Um okkurt kókar yvir, havnar meginparturin av tí í tallerkinum í staðin fyri á plátuni.

VÆL SAGT:

Nationalir fordómar og national hugmóð fær okkum at gloyma at sonn vitan er at finna undir ølium himmalhválvinum. (LaBryere)

— — — —

Ein eigur at velja sær til konu ta kvinnu, ein vildi valt til vin, um hon var mannfólk.

— — — —

Um ein hevði gjørt seg kunnugan við allar jógir, vildi eingin tíð verið til avlops at broti tær!

5 spurningar


1. Hvaðan kemur rørslan »Anonym ir alkoholikarar«
2. Hvat merkir mauseleum?
3. Hvussu kallast skotska harraskjúrtið?
4. Hvussu eitur kvantum í fleirtali?
5. Hvussu formerir krokodillan seg.

— — —

SVAR: 1) frá USA 2) sloðsligin minnisvarði 3) kilt 4) kvanta 5) leggur eðgr.

WEEK-END

– KROSSORÐ –



Yvir: 1) málari 6) fyllir 12) hiti 14) antin 15) kær 16) persónsfornavn 18) livdi 19) spæl 21) pengar 23) umráddi 25) landmál 26) stýrislag 29) eins bókstavir 30) kellingamannin 31) religión 33) lesur 34) meiningsleyst.

Niður: 1) íløt 2) tømir 3) skakkir 4) petti 5) klokka 7) drykkur 8) serskúli 9) herming 10) gifta 11) irrar 13) sløva 16) virðing 17) vøkstur 20) pengar 21) skjót 22) skrift 24) tóni 27) osi 28) neyt 30) beinagrind 32) tóni.

M O L A R HVØR SVEIK MEST.
Fjúrtandi segði, at Hilmar var svíkurin stóri við seinasta leik,
men til fastalavint, tá søgdu menn:
tað var ikki Hilmar, men Kattrup, sum sveik!

hugskot


VITAN IKKI NÓG MIKIÐ

Vitan er neyðug; men ber vitan dugir lítið; tað er neyðugt at duga at brúka hana. Um hetta sigur skaldið Sigurd Hoel í einum av sínum bókum:



»— Hann hevði eitt gott høvd, sum tað verður nevnt - men vit vita øll, hvussu lítið tað sigur um mannin. Tað er neyðugt fyri ein smið at hava eina góða øks, men tað er eisini avgerandi, um hann brúkar hana at høgga timbur við ella at høgga høvdið av einum manni — ella kanska tærnar av sær sjálvum«

FIMMARIN:



1 = spæla og ílæt
2 = gentunavn
3 = av seyði
4 = andar
5 = merkið.



— Í Paris siga mótakongarnir: ongar barm. Men tað eru tíbetur tvey til at avgera!

* * *

Vinirnir fingu Óla at ásanna, at kona hansara brúkti nógv av nógvar pengar.

— Eg skal syrgja fyri, at hon fær tað at vita, tá eg komið til hús. Nú skal sparast!

Dagin eftir spurdu vinirnir, hvussu tað gekst?

Óli: Jú, vit gjørdu av, at eg skuldi halda uppat at roykja, drekka og spæla kort!

* * *

Nú hava menn funnið uppá at gera kjólar, ið ein bara tveitir burtur, tá ein hevur brúkt teir.

* * *

Lærarin: Minnist til børn, at vit skulu bæði liva og læra!
Næmingur: Men hvat, um vit ikki hava tíð til meira enn annað?

* * *

Tað næsta verður sjálvandi, at teir finna uppá at gera náttkjólar, sum kunnu tveitast burtur, áðrenn ein hevur brúkt teir!



Keypið
frá teimum, sum lýsa í
SOSIALINUM!

KIKARIN

SKATTALÓGIN

Undir seinasta landsstýri varð framd skattalóg, sum á mangan hátt var beinleiðis høpisleys. Hetta hevur eisini »14. sept.« ásannað og í hesum samanburði skrivar »Dimmalætting«

»Vist er det rigtigt, at de nye skattelove er uhensigtmæssige og trænger til at blive gensete og forsynede med lapper hist og her; manglerne var ojensynlige allerede, da det forrige landsstyre gennemførte dem uden omtanke formentlig også uden at have givet sig tid til at se dem rigtigt igennem).
»14. September« SÅ det ikke dengang, eller turde ikke erkende, at der blev handlet overilet og aldeles uden omtanke«.

SMÁSKEMT



— Tað mangla 100 krónur í kassanum, Joensen, og bara eg og tygum hava lykilin.
— So haldi eg, at vit leggja hvør sín 50-krónuseðil í kassan hvør, og so er tað úti av verðini.

BORTÚT

* var tað eitt misálit uttan líka,
* tá ið løgmaður sat einsamall-
* ur við sínum monnum og bara
* Kjartan Mohr aftrat burtur úr
* allari sjálvstýrisfylkingini at
* vísa mátt og megi sjálvstýris-
* rørslurnar!

FUGLUR: Tá tú setur bókstavarnar niðanfyri annarleiðis saman, fært tú eitt fuglanavn:

PMRNSAÍÍÝ

Veitst tú

AT løgmannsraðið í Føroyoyum í nýggjari tíð hevur verið hetta: 1948—50: Andreas Samuelsen, 1950—1958: Kristian Djurhuus, 1959—1962: P. M. Dam, 1963—1966: Hákun Djurhuus og frá 12. januar 1967: P. M. Dam.

AT hin fyrsti brúkiligi kavbáturin varð gjørdur av hollendaranum Cornelius van Drebbel longu í árinum 1620.

AT geisping hevur eina sera góða ávirkan á bæði kropp og nervar menniskjans.

AT í einstøkum stoðum yviri í Kentcky í USA er grasið litað blátt.

AT síðan 1950 er tað hent, at tað hava verið fleiri konufólk enn mannfólk í Ameriku.

AT billiardspælið, sum nú er sera væl umtókt millum manna, funnu teir uppá longu í 16. øld í Italiu.


AT ein ketta er fullvaksin, tá ið hon er umleið hálvtannað ára gomul.

AT hitt sterkasta beinið í mannalíkaminum er skinnabeinið.

AT tjóðveldisflokkurin, sum í dag eigur bara 5 tingmenn, á einum sinni átti 7.

LOYNDARMÁL:

Tá tú hevur funnið orðini niðureftir, fært tú á 2. og 4. reglu navn fyriskreytlutum:



1) gentunavn 2) merkjum 3) baðaðu (øvugt) 4) klosturmaður 5) mjólk 6) sær 7) biligt.

SJÓVINNA

Okkara 1966

Tað verður ongatíð rættiliga torført hjá okkum at gera upp, hvussu eitt ár royndist skipaflotanum viðvíkjandi — tølini verða ikki so stór.

Føroyski fiskiflotin fekk í fjør sín fyrsta fabrikstrolara, »Kap Farvel«, 724 brt. Skipið er 3 ára gamalt og keypt úr Vesturtýsklandi.



Eitt minni ferðamannaskip varð skrásett sum fiskiskip. Eitt ferðamannaskip fór burt ur av — »Sigmund ur«.

4 stálskip, bygd í árunum 1958—61 vórðu seld av landinum, meðan 5 gomul fiskiskip vórðu strikað av skipalistanum. Samlað aftur gongd: 636 tons.

Burtur úr skipaflotanum fóru Ása og Karl Peter (sandbátar), Sigmundur (ferðamannaskip), Sumba (hvalabátur), Fagranes, Gullfinnur II, Mars, Minnie, Stella Kristina, Stella Maria, Vesturvón, Viðanes og Hekla (fiskiskip. Í alt 2.036 tons.

Nýkomin skip:


Cathrine (farmaskip	**300 tons**
Chr. Holm (farmask.)	**339 tons**
Kap Farvel (trolari)	**724 tons**

Rímsmiðjan

Nógv gjørdu bløð burtur úr »himmalbrævinum« hjá javnaðarflokkinum; nú verður skrivað í Dimmalætting, at eisini tjóðveldismenn hava sent »himmalbræv« til Grønlands undan seinasta vali.

Hitt mikla himmalbrævið
frá Dam og kompagni
í flestu landsins bløðum
elvdi mikið stríð;
men tá ið tjóðveldismenn,
sum so seinir mugu vera,
royndu hetta himmalbræv
til síðsta val at kopiera,
úr sambands-grønlandsmonni
sprakk hitt síðsta tolið:
tit mitt navn og bátanummar
onkunstaðni hava stolið!

KLOKKUGÁTAN:



1— 2 = 51
2— 6 = ringum
6— 7 = skipastytting
8—11 = skottilfar
11—12 = jarðamát.

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT við seinasta val var hitt sokallaða »sjálvstýrislandsstýrið« vrakað av fólkinum, og at tá ið løgmaður skuldi veljast var »sjálvstýrishøvdinguríni«, Hákun Djurhuus, løgmaður, vrakaður av sínum egnu lagsbrøðrum — tjóðveldismonnum.